LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

GRØNUR PEUGEOT 306 HDi
er til søluvegna skúlagongd í DK. Árg. 06/99 og hevur koyrt 96.000 km. Hann hevur 17" AEZ felgur, gott anlegg og takspoylara. Alt hetta er nýtt. Bilurin er væl viðfarin og selist um hóskandi boð fæst. Hann sæst á bil.fo
Tlf. 213790

HYUNDAI ACCENT 1.5i GLS
árg. 1995, koyrt ca. 93.000 km í góðum standi, sýnaður í aug. 2004 til solu fyri 27.000 kr.
Tlf. 322650 ella 228918

LANDCRUISER 4.0
árg. 10/88, í góðum standi. Prísuppskot 55.000 kr.
Tlf. 509998

TOYOTA SPORT
bussur til solu. 7 pers. árg. 87, sýnaður 08/2004.
Tlf. 580100 eftir kl. 20

TIL BMW
Nógvir deilir til E30 árg. 86-91 til solu.
Tlf. 445065/223802

TVEIR TOYOTA COROLLA
Árg. 85-86. Kr. 3.000. Kunnu nýtast sum eykadeilir.
Tlf. 444748

SAAB 900 1986
Sælges billigt, skal ikke synes, kører godt, men der er rust i dørene. Henvendelse på
Tlf. 541440

DIESEL STATIONCAR
Opel Astra 1.7 TD til solu. Árg. juni 96. Koyrt 89.600 km. Sýnaður febr. 2004. Ring
Tlf. 212320

FØROYA BEST RØKTI
20 ára gamli Volvo 240 til solu.
Tlf. 447942

EYKALUTIR
til Toyota Carina, árg. 97, til solu.
Tlf. 227922

TIL DYNA 300
Motorur 3.000 kr.
Tlf. 227922

TIL SØLU
Dekk, Trailblazer 33x12 50x16.5 440-80x28.
Tlf. 210452

TOYOTA COROLLA 1.3
Árg. 86, biliga til solu. Góð dekk, krevur ábøtur, koyrir annars væl. Ring
tlf. 322483

MAZDA 626
árg. 96, koyrt 112.000 km til solu.
Tlf. 214301

HEILÁRSDEKK
á alufelgum stødd 195/60-15 til solu fyri kr. 2.500
Tlf. 554508

FORD FIESTA
Ford Fiesta til solu 1.6 diesel árg. 87. Treingir til ábøtur
Ring 251265

DIESELBILUR TIL SØLU
Peugeot 306 1.9 D, km 185.000, 4 hurðar, til solu.
Tlf. 224508 eftir kl. 15

VW PASSAT
st.car árg. nov. 1991 í góðum standi til solu. Sýnaður mars 2004.
Tlf. 421343/504201

OPEL KADET 1.6
til solu fyri kr. 5.000,-
Tlf. 456094

FORD ESCORT 1.6i
árg.91 við 15" sportfelgum og fløguspælara. 4 eyka sportfelgur við nýggjum heilársdekkum á. Biliga til solu.
Tlf. 722203

TOYOTA STARLET 1.3 XLi
Árg. des. 92, reyður, koyrt 144.000 km og nýsýnaður. Til solu vegna keyp av størri bili.
Tlf. 319197

DEKK TIL SØLU
Heilársdekk á alufelgum stødd 195/60-15 til solu fyri kr. 2.500.
Tlf. 554508

COROLLA 1.3
Svartur Corolla til solu vegna flyting. Hevur koyrt 102.000 km, 4 nýggj pikadekk á felgum fylgja við. Til solu fyri 55.000 kr. Sær gott út.
Tlf. 447310

TIL SØLU
Ein Hyundai Accent frá juni 2001. Koyrt 45.000 km.
Tlf. 255279

YNSKIST
Nissan Bluebird 2.0, árg. 85, ynskist til eykalutir. Vinarliga ring
Tlf. 260956

TIL SØLU
Tvey summardekk 185/70-14.
Tlf. 218267

TIL SØLU
Nissan Primera 2.0d árg. 95 koyrt 150.000 km, hevur 17" sportfelgur, vetrardekk á felgum fylgja eisini við, cd-spælara, el-rútar, sentrallás og er annars í góðum standi.
Tlf. 210809

TIL SØLU
Mazda 323 BF 1.6 árg. 1988 til solu fyri 6000 kr. Sýnaður 2004.
Tlf. 250380

TIL SØLU
Renualt Kangoo, árg. 99, í sera góðum standi, koyrt 58.000.
Tlf. 317154 ella 265818

OPEL CORSA 1.4i
árg. 94, sýnaður jan. 04, 111.000 km, er í góðum standi og er vælviðfarin.
Tlf. 261905 ella 447856

4 STK. SPORTFELGUR
til solu. 15" av merkinum Fondmetal við hampuliga góðum summardekkum, passa til Toyota Carina, Celica o.s.v. Einans 1.500 kr.
Tlf. 222980

TIL SØLU
Honda Accord, penur, koyrir perfekt, skal sýnast, 3.000 kr.
Tlf. 270628

OPEL VECTRA 2.0 TD
bilurin hevur anlegg, sportfelgur og eyka felgur við dekkum.
Tlf. 777211

MITSUBISHI LANCER 1.6
árg. 92, koyrir væl, krevur nakrar ábøtur. Biliga til solu.
Tlf. 215272/322239

RENAULT CLIO 1.4
árg. 91, nýsýnaður 08.04. Koyrt 112.000 km, pikadekk og anlegg fylgja við.
Tlf. 456021

LUTIR TIL VOLVO MD31
m.a. innsúgving og útstoytmanifold, eisini útstoytslangur, ið hava mátini ávikavist 60 mm & 85 mm. Eisini eru nøkur vatn rør v.m.
Ring á tlf. 222511ella 215804

MAZDA 323 TIL SØLU
Árg. 89, koyrt ca. 200.000 km, er myrkagráur. Bilurin startar væl, koyrir væl og er sera økonomiskur.
Tlf. 228186

UM HÓSKANDI BOÐ FÆST
Er ein VW Caravella 24 diesel, 10 pers. minibussur, árg. 94, til solu. Væl hóskandi til familjubil.
Tlf. 229424

17'' FELGUR UTTAN DEKK
Passa til Mercedes, Audi og aðrar bilar. Prísur 3.000 kr.
Tlf. 226099, Søldarfjørður

DEILIR TIL NISSAN KING CAB
Árg. 88 til solu.
Tlf. 226099, Søldarfjørður

NISSAN PATROL 4X4
Árg. 86, km. 210.000, nýsýnaður. Prísur 17.000 kr.
Tlf. 226099, Søldarfjørður

TOYOTA COROLLA DIESEL
Árg. 1990. Nýsýnaður, til solu fyri 19.000 kr.
Tlf. 226099, Søldarfjørður

ORGINALAR F.F. 14''
Siggja út sum nýggjar. Nýprísur 5.400 kr. Nú 2.000 kr. Hava sitt á Escort.
Tlf. 215060

MAZDA 323 1.5
árg,1988 við sleipikróki til solu.
Tlf. 447328/211002

BILSETUR TIL SØLU
2 spildurnýggj baksetur á 3 sitiplás bíliga til solu. Vælegnað til minni buss ella vøruvogn.
Tlf. 219325

TUNINGSBOKS TIL SØLU
passar til allar HDi motorar, ongantið brúkt.
Tlf. 213737

4 PÍKADEKK Á FELGUM
155/80 R13, fýra hol, hava staðið á Toyota Corolla, 500 kr.
Tlf. 229913

PEUGEOT 309
diesel til solu sum eykalutur.
Tlf. 575158/375158

NISSAN PRIMERA
árg. 1990, sýnaður 2003 til solu fyri 12.000 kr.
Tlf. 575158/375158

FORD MONDEO 2.0 TREND
okt. 02, 32.000 km, ymisk eyakútgerð. Til solu um hóskandi boð fæst. Møguliga minni bilur kann ganga inn í keypið.
Tlf. 210926

PEUGEOT 306
diesel, árg. 95 í góðum standi, til solu.
Tlf. 260509 eftir kl. 17

BMW 324 TD TOURING
árg. 91, sýnaður 07/04 til solu. Koyrt 312.000 km, motorur 225.000 km.
Tlf. 507167

FORD FIESTA
11 ára gamal, til solu fyri 2.000 kr.
Tlf. 581378

Amboð

BLANDIMASKINUR OG TRILLUBØRUR
Tilboðsprísur í september.
Kaj Andreasen, tlf. 315600

VARIANT VIÐFESTISVOGNAR
Ymisk modell á goymslu.
Tlf. 315600 Kaj Andreasen & Co

EIN SNIKKARABONKUR
ynskist til keyps. Vinarliga ring
tlf. 310734 eftir kl. 17

Arbeiði

EG ÁTAKI MÆR AT SMÍÐA
og/ella umvæla føroyskar bátar. Ringi og hoyri nærri.
Tlf. 421674, 225585 ella 721674

GRAVIMASKINUR TIL LEIGU
Tilboðsprísur í september. Umframt nógv onnur útleiguamboð.
Kaj Andreasen & Co., tlf. 315600

ARBEIÐI YNSKIST
14 ára gomul genta søkir arbeiði eftir skúlatíð. Ælt hevur áhuga. Ring á
tlf. 371047/267820

TILBOÐ YNSKIST
upp á arbeiði at skifta asbestekju út við alminiumstekju á eldri setshúsum.
Tlf. 509389

TILBOÐ
Ynskist at umvæla tekju og at skifta takrennu.
Tlf. 215603

VIT ÁTAKA OKKUM
ymisk smáarbeiði, so sum laga garð, stoypa, gera tún, pussa grund/garð, mála og smíða. Helst í Tórshavnar økinum.
Tlf. 257315

EG ÁTAKI
mær alt reingeringsarbeiði. Hevur hetta tín áhuga,
ring 508850

FA. HÚSAUMVÆLING OG HÚSASMIÐ
Alt timburarbeiði verður gjørt. Nýtt sum gamalt, úti sum inni. Royni okkum.
Tlf. 215214

Barnaansing

BARNAGENTA YNSKIST
At passa 3 ára gamlan drong uml. 2 kvøld um mánaðin.
Tlf. 313293

Barnaútgerð

BILSTÓLUR
til 0-8 mðr. gamalt barn til solu fyri 200 kr. Stólurin er í góðum standi.
Tlf. 517542

BERISTATIV
til barn, 6 mðr. og eldri, at hava á rygginum, til solu fyri 400 kr.
Tlf. 517542

TIL SØLU
Myrkagráur Odder barnavognur v/ lufthjólum, lift, regnskjóli og madrassum. Nýttur til 1 barn 3.500,-
Tlf. 514954

TVÍBURABARNAVOGNUR
til solu fyri 3.000,- kr. Hevur regulerbart handtak, 5 punktselar, innbygt flugunet og regnslag.
Tlf. 314545

KOYRISTÓLUR
Ein Brio koyristólur við galesju, koyriposa og regnslagi til solu fyri 1.300,- kr. Aftaná kr. 17 á
tlf. 314545

BORÐSTÓLUR YNSKIST
Borðstólur at festa á borð ynskist.
Tlf. 421571 ella 255077

TIL SØLU
Barna skrivaraborð, hvítt, við hillum og skuffum, 111x49x144 cm. Tilhoyrandi reol, við skápi og skuffu, 146x31x185. Verður selt saman fyri 450 kr. Tremmubarnasong, hvít, við madrassu. Prísur 350 kr.
Tlf. 311430

TIL SØLU
Brio barnavognur, bláur, sum nýggjur, til solu fyri 2500 kr.
Tlf. 211525

LIFTNET YNSKIST
Um tað er nakar, sum hevur eitt liftnet, til at spenna babylift fasta í bilin við, at selja okkum, vinarliga ring
Tlf. 503032

TIL SØLU
Barnastólur (shoppari) til solu fyri 300 kr.
Tlf. 311441/514114

TVÍBURAVOGNUR
av merkinum Simo Bertini kombi við soft liftum til solu fyri 4.200 kr. (nýprísur 6.200 kr.) er næstan ikki brúktur. Undirstellið er nýtt.
Tlf. 211080

Bátaútgerð

GEAR TIL SØLU
Hydraulsikt Borg Warner bátagear model Velvet Drive AS 14-72C við útvekslinginum 2,57:1, biliga til solu.
Tlf. 314122/264454

TIL SØLU
6 mannafar biliga til solu.
Tlf. 361362

TIL SØLU
Ein 15 fót segljolla av slagnum »Nordborg jolle«. Eitt sett av seglum við spílara, vogni og el páhangara fylgir við. Prísur 10.000,-
Tlf. 210355

HUMMARALOYVI
Hummaraloyvi á Tangafiriði ynskist.
tlf. 226661/421585

8-MANNAFAR TIL SØLU
Sera væl hildið 8-mannafar til solu v/fiskiloyvi, um hóskandi boð fæst. Ring
Tlf. 724790 ella 724331

FÝRAMANNAFAR TIL SØLU
úr Kaldbak (árg. 82-83), viðt,7,5 HK Mercury páhangsmotori til solu.
tlf. 332562 eftir kl. 18

SPEEDBÁTUR
Opin speedbátur uttan motor, í góðum standi, bíliga til solu.
Tlf. 213195

TIL SØLU
4 kassar á 500 pund.
Tlf. 581743

TIL SØLU
Eitt farvu ekkolodd.
tlf. 581743

TIL SØLU
Tvær snellur BJ/5000 svenskar.
tlf. 581743

6-MANNAFAR TIL SØLU
Kaldbaksbátur, Volvo Penta 18 HK, kumpass, VHF, møg. NMT 450 og ekkolodd, til solu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 314328/214328

YNSKIST TIL KEYPS
Tristur ella tríbekkur ynskist til keyps.
Tlf. 311041 ella 581208

VATNSKUTARI YAMAHA
GP 1200R, 150 HK, gongur 60 mil, til solu til hægstbjóðandi.
Tlf. 270622 ella 211235

LÍNURENNA
Glastrevja línurenna, sum nýggj.
Tlf. 221688

LITEKKOLOD YNSKIST!
Til ein minni útróðrarbát.
tlf. 213992/313992

Bingo

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyrar Klubba tórsdagin 9. september kl. 19.00.
Nevndin

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
hevur BINGO í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikudagin 8. september kl. 18.00. Limirnir kunnu taka gest við.
Pensionistafelagið í Havn

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánadagin 6. september, kl. 19. Nógvir góðir vinningar.
Astma- og Allergifelagið

SEYÐABINGO
Stórt Bárubingo verður í Skálanum mánakvøldið 6. sept. kl. 19.30. At vinna vera veðrar og lomb. Vinningurin til fulla plátu: Nátar. Gjaldast kann við FR-VISA-korti. Tað verður bert eitt seyðabingo í ár.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

BINGO
Bingo verður í Felagslonini í Fuglafirði leygarkvøldið 4. sept. kl. 19. Á lutaseðli: Lamb í heyst.
Eldrafelagið Borgin

BINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin 5.9. kl. 16. Gávukort til øll spølini. 75,- 150,- 500,- kr. Á lutaseðli 12 x 100 kr. og 3 x 1000 kr. Bingola, eykaspæl, koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

HEIMABINGO HJÁ 8.A
í Vágs Skúla. Hesi hava vunnið: Gávukort tlf. nr. 370060. Krúllijarn tlf. nr. 374075. Gávukort tlf. nr. 373103. Nakkasteik tlf. nr. 373299. Gávukort tlf. nr. 373929. Hønsarungar tlf. nr. 373175. Kalvi o.a. tlf. nr. 370554. Nakkasteik tlf. nr. 373359. Seingjasett o.a. tlf. nr. 370368. Gávukort tlf. nr. 373409. Stóra takk fyri stuðulin.
8.a í Vági

BINGO
Haldórsvíkar Avhaldsfelag hevur gott bingo sunnudagin 5. sept. kl. 16.00 í Eydnuni. Á lutseðli verður m.a. 4 fjórðingar av 14 mán. gjørnlum tarvi. Eykaspælið er 1.500 kr.
Nevndin

GOTT BINGO
verður í Tórshøll leygardagin 4. sept. kl. 20. Øll eru vælkomin.
Tórshøll

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini týskvøldið 7. sept. kl. 19.30. Nógvir góðir vinningar m.a. 500 kr. og lamb í heyst. Drigið verður millum spølini. Eyka-eyka spæl verður.
KFUM skótarnir

Bøkur

FHS-BØKUR TIL SØLU
Marknaðarlæra 120,-kr.
Samfundslære 150,- kr.
Búskapur og Roknskapur grundbók 65,- kr.
Búskapur og Roknskapur uppgávubók 80,- kr.
The Lift 90,- kr.
It's my Business 100,- kr.
Tlf. 310516 best um kvøldið

BØKUR TIL 2.S Í HOYDØLUM
er nakar id vil selja mær hesar bøkurnar:
Alltiders Geografi,
Verdenshistorie 2,
Eksamensopgaver i matematik B-niveau,
La hija del Puma,
»Et dukkehjem«,
»Den kronologiske uskyld« og eina bók til sálarfrøði á miðstig.
Vinarligast ring
332847/251847 (eftir kl. 15.30)

BØKUR TIL SØLU
Motality Play + workbook 100 kr.
En Vivo tekst + øvebog 180 kr.
Spurvesol bind 2 200 kr.
Stof og energi + opg. hæfte 100 kr.
Nýbrotið 50 kr.
Litteraturens veje 200 kr.
Hus og hjem (Helle Helle) 50 kr.
Sicario 120 kr.
Jenseits der stille 80 kr.
Romeo og Juliet 50 kr.
Ring aftaná kl. 18 ella sms'a á
Tlf. 522293, Beinta

BØKUR YNSKJAST TIL KEYPS
Eg gangi á student og mær nýtist hesar bøkur: Slóðir og Fejlstøvsugeren. Um tú vilt av við eina av hesum bókum, til ein sámuligan pris,
ring ella sms á 581287

BØKUR TIL MÁLSLIGU
deild í studentaskúlanum til solu. Ring og hoyr nærri
tlf. 251786

Burturm. /funnið

KETTLINGUR FUNNIN
Svartur og hvítur kettlingur funnin við Shell á Hálsi 26/27. september. Hann er mest svartur og hevur eitt grátt hálsband um hálsin.
Tlf. 311430/313484/511430

GRÁ MUSTANG DREINGJASÚKKLA
horvin av Norðastahorni. Um onkur hevur sæð mína súkklu, hevði eg verði sera takksamur, um tit boðaðu frá á
Tlf. 318047, Sasho

REGNJAKKI
myrkabláur, funnin í Blásastovu í Norðragotu.
Tlf. 222717

SILVURBROSJA
Funnin á Argjum.
Tlf. 310677

HALLÓ!
Eg eri ein gloymdur ruggustólur, sum bleiv sendur til lækna á Tinghúsvegnum. Eg eri langt síðan friskur, men læknin veit ikki, hvør eigur meg. So um tú eigur meg – kom skjótast eftir mær.
Heilsan Ruggustólurin

TRÝHJÓLAÐ BARNASÚKKLA
av merkinum Winther funnin í Krossgotu. Eigarin fær hana við at ringja
tlf. 313134

FUNNIÐ
Billykil til Nissan við lyklaringi funnin á veg niðan á Svangaskarð á Toftum.
Tlf. 260941

ER ONGIN
ið saknar eina bláa súkklu við 26 tumma hjólum av merkinum "Monark"...? Hevur staðið úti í Grønlandi síðan Ólavsøkuaftan.
Ring á tlf. 222511

TEPPI BURTURMIST
Um onkur hevur funnið eitt bundið teppi, ráhvítt við grønum kanti, burturmist við SMS 22. august, so vinarliga ring
tlf. 444447

BROSJA
forma sum summarfuglur, við perlum, burturmist í Havn leygarkvøldið 21.08. Um nakar hevur funnið hana, vinarliga ring
tlf. 227048

Býli

GOTT KAMAR
í eysturbýnum til leigu til ikki roykjara.
Tlf. 212345

RAÐHÚS TIL LEIGU
í miðbýnum. 135 fermetrar, køk, 2 stovur, 4 kømur og baðirúm. 6.800,- kr. pr. mðr. + ljós og hita. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1910/1

KAMAR TIL LEIGU
Kamar til leigu í Havn, atgongd til køk, bað og stovu.
Tlf. 584014

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Í KFUK í Havn.
KFUK, Varðagøta 9, tlf. 311928 ella 211824

TVEY KØMUR TIL LEIGU
Í Vestubýnum við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu. Nær við Læraraskúlan
Tlf. 221158 ella 313799

SUMMARHÚS Í LEYNUM
Hevur tú hug at leiga eini hugnalig hús í Leynum eitt vikuskifti ella nakrar dagar? Har er altið hugnaligt, líkamikið hvussu veðrið er. Peis úr føroyskum grótí í stovuni, grill úr gróti uttanfyri og stór terassa o.a. Sí myndir: www.carrent.fo
Tlf. 217300

KAMAR Í KBH.
Kamar til leigu í Keypmannahavn. Tú skalt deila íbúðina við mær og 7 ára gamla soninum. Íbúðin, sum liggur 3 min frá Hovedbanegården, hevur allar hentleikar - vask, breiðband, kaðaltv, egna telefon v.m. Kostnaður: 4.000 kr. pr.m. við øllum.
Tlf. +45 26131011 ella mail: birgitannika@hotmail.

KAMAR TIL LEIGU
Kamar til leigu í Havn, atgongd til køk, stovu og bað.
Tlf. 584014

PARTVÍS
møblerað kamar til leigu, til fólk ið ikki roykir. Liggur nær við lærara- og sjómannsskúlan.
Tlf. 513232

HJÁLP!
Familja við 4 børnum leitar eftir íbúðhúsi til leigu í Havn skjótast gjørligt. Húsini vit búgva í eru seld! Min. 3 kømur.
Tlf. 270127 eftir kl. 15.30

ERT TÚ FITT/UR?
So havi eg eitt kamar til leigu frá 1. sept. fyri 2.500 kr. um mánaðin við atgongd til allar hentleikar.
Location: Nærhendis Fragd og Fimi.
Tlf. 225422

HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST
Til leigu í Tórshavn skjótast gjørligt.
Tlf. 211731

ÍBÚÐ TIL IKKI-ROYKJARAR
Íbúð í attraktivum og friðarligum oki í miðbýnum í Havn til leigu. Umleið 40 fermetrar, kamar, stova, kokur og bað. 3.000 kr. um mánaðin umframt ljós og hita. 3 mánaða depositum. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1908/3

KAMAR TIL LEIGU Í KBH.
Frá 1. nov. er eitt 16 kvm. kamar á Amager til leigu við felags køki, stovu og bað. Leiga 2800 kr. + 3 mán. depositum.
Tlf. +45 22906295 aftaná kl. 17

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í HAVN
90 fermetrar, køk, stovu, baðirúm og 2 kømur. 5500,- um mánaðin + ljós og hita 1 mðr depositum
Tlf. 266509

ÍBÚÐ Í KBH
Ynskist til leigu í viku 37 ella 38.
Tlf. 216034

GRUNDQVI
510 femetrar, við Løgmannabreyt, til solu fyri besta boð yvir 450.000 kr.
Tlf. 327108

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Góð íbúð til leigu mitt í býnum, til eitt friðaligt, edrúliguligt fólk, ikki roykjara. Prísur: 3.500,- ljós og hiti iroknað.
Ring 316683/516683

ÍBÚÐ YNSKIST!
Mamma við tveimum børnum ynskir íbúð í Havn skjótast møguligt. Max. 4.500 pr./mðr. við ljósi og hita. Fara væl um og gjalda rættstundis.
Tlf. 223339, Kristina

NÝGGJ 1-RÚMS ÍBÚÐ
við øllum hentleikum – vælegnað til ein persón – til leigu í 6 mðr. frá 15. sept. til ikki roykjara. Kostnaður 2.800,- við øllum.
Tlf. 215102

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Liggur miðskeiðis í Havn, køkur, stova, kamar, baðirúm. Atgongd til vaskimaskinu. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1907

HJÆLP
Vi er en familie på 1 voksen og 4 børn, som leder desperat efter noget at bo i. Fra på lørdag den 3.9.04, har vi ikke noget sted at bo. Alt, i Torshavn, eller 1/2 times kørøafstand fra Havn har interesse. Ring venligst efter kl. 18.
Tlf. +45 29658234

KAMAR TIL LEIGU
í vesturbýnum. Atgongd til køk, bað og vaskimaskinu.
Tlf. 217142

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
í 1-vær. íbúð til ein persón til leigu í sept. og okt. mánað.
Tlf. 312746

KAMAR Á ARGJUM
Kamar til leigu á Argjum frá 15. sept. Áhugað ringi á:
tlf. 592020 ella 223830

STÓRT KAMAR TIL LEIGU
í Havn. Atgongd til bað, stovu og køk.
Tlf. 314805 ella 264903

KEYPMANNAHAVN
Kamar til leigu, allir hentleikar, tætt við KBH. Ring og hoyr meira á
tlf. +45 26489955

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Eg eri ein ung genta, sum ynski lítla íbúð ella gott kamar at leiga fyri sámuligan pris. Eg eri friðarlig, fari væl um og gjaldi til tíðina.
Tlf. 222189 eftir kl. 16.00

Dýr

HUNDAHVØLPAR
3 sera fittir hundahvølpar fáast við at avheinta teir. Mamman er ektaður boxari.
Tlf. 441234

TIL SØLU
Hálvvaksin kanin til solu fyri 50 kr.
Tlf. 422027

DVØRGAHAMSTRARAR
2 mánaðar gamlir, latast ókeypis til djóravin.
Tlf. 316165/259338

HUNDAHVØLPAR
Border Collie, 10 vikur gamlir, til solu.
Tlf. 333361 ella 210361

KETTLINGUR
Ein fittur kettlingur verður latin til djóravin.
Tlf. 266172

HEY!
Eg havi tveir so fittar kaninungar sum hava reyð eygu og eru hvítir. Ógvuliga væl passaðir, 100 kr. hvør. Tær eru honir. Um tit hava áhuga, so ring á
tlf. 448955

ER TAÐ NAKAR
sum kann selja mær tvær dvørgakaninir, helst við hangioyrum.
Tlf. 271986/317228

KETTLINGAR
4 sera fittir kettlingar fáast við at avheinta teir, eru reinligir, duga at eta og leppa.
Tlf. 444458

REYÐSTRÍPUTUR KETTLINGUR
Fittur frensur (10 vikur) undan sera spakari kettu verður latin djóravini. Dugur at eta, leppa og at brúka kettukassa.
Tlf. 315849

3 SERA FITTIR KETTLINGAR
við tumlum. Teir duga at eta og leppa og eru sera vakrir. Kunnu latast nú. Bert til djóravinir.
Tlf. 217775/222830

ER TAÐ NAKAR
ið eigur eitt fuglabúr at selja mær!
Tlf. 315444/215445

FITT MARSVÍN
Eitt sera fitt marsvín selist bert til djóravin, fløska, hús og stórt búr fylgir við.
Tlf. 257983

KETTLINGUR
svartur/hvítur kettlingur undan sera barnavinarligari kettu verður givin til djóravinir.
Tlf. 448431/213501

DVØRGAHAMSTRARA-UNGAR
verða latnir fyri 50,- kr. stk.
Tlf. 321291/521291

SERA FITTIR
kettlingar fáast við at avheinta teir.
Tlf. 441193

TARVKÁLVUR TIL SØLU
Tveir tarvkálvar – ein 2 mðr. og ein 2 vikur – til solu.
Tlf. 328160/254742

MARSVÍN
til solu fyri 100 kr.
Tlf. 503330 ella 314775

Fundir

OKUR BYRJA AFTUR
onskvøldið 8. sept. kl. 19.30 í Øravík. Nýggir limir eru vælkomnir.
Pensionistafelagið H.Ø.F.T.

VESTMANNA ARBEIÐARAFELAG
Ársaðalfundur felagsins verður leygardagin 11. sept. kl. 16.00 í Bygdarhúsinum. Er fundurin ikki viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur hálvan tíma seinni.
Nevndin

TÓRSHAVNAR FROSKMANNAFELAG
Ársaðalfundurin verður mánakvøldið 27. september 2004 kl. 21.00.
www.kaving.fo

Húsarhaldstól

KOMFÝRUR
Komfýrur av slagnum Gorenje biliga til solu.
Tlf. 506030

TIL SØLU
Electrolux køliskáp til hús, bát ella bil. H. 81, br. 53, d.54. Er til 220 V ella gass. Prísur 1.500 kr.
Tlf. 424407

YMIST TIL SØLU
Zanussi vaskimaskina til solu fyri 1.200 kr.
Zanussi turkitrumla til solu fyri 500 kr.
Sovisofa 120 x 200 til solu fyri 500 og ein dupultsong 180 x 200 kann fáast við at avheinta hana.
Tlf. 269446

FRYSTISKÁP YNSKIST
Til keyps. Má gjarna verða stórt.
Tlf. 519782 eftir kl. 14

BRÚKT KØLISKÁP
við lítlari boks, biliga til solu.
Tlf. 315089

VESTFROST KØLI/FRYSTISKÁP
184 cm høgt til solu fyri 1.000 kr. og ein Voss gasskomfýrur v/ gassovni, 1.000 kr.
Tlf. 250084

MORSØ KOMFÝRYR
til solu um hóskandi boð fæst
Tlf. 222326

RAINBOW
dustsúgvari til solu.
Tlf. 372173

Innbúgv

LEÐURMØBLAR
Brúnir leðurmøblar 3 + 1 + 1 til solu.
Tlf. 504800

BOX- ELLA SPRINGMADRASSA
ynskist til keyps 200 x 150.
Tlf. 503820/258613

TIL SØLU
2 Lama Jubileum springmadrassur 85x200 til solu fyri 250 kr. stk.
Tlf. 313057

TREMMUSONG YNSKIST
Tremmusong har botnurin kann flytast upp og niður ynskist.
Tlf. 269603

HORNASOFA
ið kann leggjast út, til solu. Sofan er træ og grønt (myrkt) betrekk, 4 ára gomul og lítið brúkt, 2.000 kr.
1 sjónvarpsborð á hjólum, bøg, 300 kr.
Møguligt at fáa koyrt út í Havn/umráði. Ring eftir kl. 18.00
Tlf. 322159 ella 222223

EIN LÍTIÐ BRÚKT SOVISOFA
v/ springmadrassu frá Ilva stødd 140 x 200 til solu fyri 4.000 kr. Nývirði 7.999 kr.
Tlf. 229942 eftir kl. 17

GAMLAR
trækommodur ynskjast til keyps. Alt hevur áhuga !
Ring 312746 ella 512746

EITT STÓRT LJÓST SKRIVARABORÐ
Lítið brúkt + eitt blátt/grønt mynstrut gólvteppi 200x135, biliga til solu.
Tlf. 313799 ella 221158

SOVISOFA
biliga til solu.
Tlf. 250486

YMIST TIL SØLU
Dupultsong 180 x 200 til solu fyri 1.200 kr.
Sovisofa 120 x 200 600 kr.
Vaskimaskina av slagnum Electrolux 1.500.
Turkitrumla 1.000 kr.
Tlf. 269446

DUPULTSONG TIL SØLU
Svørt metall song til box-madrassu (frá Skemmuni). Stødd: 140X200. Prísuppskot 350 kr.
Tel. 503032

SVØRT JARNSONG TIL SØLU
140 x 200 song til box-madrassu til solu fyri 350 kr. Sær út sum nýggj. Nýprísur: 750 kr.
Tlf. 217322

BLÁUR LENISTÓLUR TIL SØLU
Stoff lenistólur til solu fyri 200 kr. Sær gott út. Nýprísur: 500 kr.
Tlf. 217322

YMIST TIL SØLU
3 + 2 manssofa ektað velour bert eina mánað gamalt til solu. Ymiskir møblar til solu, sofa, kókasstólar, o.a.
Tlf. 211525

HYGG HER!
Hornasofa í finasta standi til solu. Nýprísur 17.000 kr. Ring, so kunnu vit tosa um pris.
Tlf. 257983

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Svartur leðurstólur við skamli frá í ár, nýprísur 8.800,- nú 4.000,-
Ljóst lakerað kommoda við 4 skuffum 300,-
2 ljóst lakeraði seingjarborð á 150,-
Tlf. 316087/216087/270387

TIL SØLU
Tvær hvítar sofur til solu, sum nýggjar, 3.000 kr. stk. ella 5.500 kr. fyri báðar.
Tlf. 272965

Leikur

TIL SØLU
Ein »Askepot« borg ið bert er nýtt nakrar fáar ferðir til solu fyri 500,- kr. Nýprísur 1.100 kr.
Tlf. 310734

LANDASTROK
Eigur nakar eitt Landastrok at selja mær, so vinarliga ring
Tlf. 421571 ella 250577

Pløgg

KONFIRATIÓNSKJÓLI
Lilly, stødd 38, niðurdeilur, toppur og sjal.
Tlf. 741744 ella 771744

TIL SØLU
Konfirmantaklæði til drong, buksur, skjúrta og sloyfa, bert brúkt eina ferð, sær út sum nýtt, til solu fyri bert 500 kr.
Tlf. 253240

ÚTSØLU-PARTY
Klæðir til kvinnur í øllum aldri. Vit hava eisini nógv smart í stórum støddum. Leygardagin 4. sept. kl. 14.00 á Flatnavegi, Signabø.
Nicolina, tlf. 421186

ADIDAS GAGGUR
Til solu fyri 200 kr. Stødd 38 2/3
Tlf. 221263

DRAKT - HAVNAR FIMLEIKARFELAG
Stødd 10 ár, er til solu. 150 kr. Grøn skótaskjúrta 10/12 ár, er til solu, 150 kr.
Tlf. 221263

JAKKI - SPORTY
Við reklamum uppi á - kanska til MC-listar, til solu, 200 kr.
Tlf. 212289

TIL SØLU
Konfirmatiónskjóli + skógvar, stødd 38, til solu fyri 900 kr. Keypt nýtt í mars 2004 fyri 1.800 kr. Brúkt 1 ferð.
Tlf. 316264 eftir kl. 15

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

- ❑ Akfør
- ❑ Barnaansing
- ❑ Bingo
- ❑ Býli
- ❑ Dýr
- ❑ Innbúgv
- ❑ Matur
- ❑ Súklur
- ❑ Út-& sjónvarp
- ❑ Amboð
- ❑ Barnaútgerð
- ❑ Brævaskifti
- ❑ Bøkur
- ❑ Fundir
- ❑ Lutaseðlar
- ❑ Pløgg
- ❑ Teld